# Fiskimálaráðið

**Lógartænastan**

Dagfesting: 10. juni 2020
Mál nr.: 20/00277-1
Málsviðgjørt: USW-BL/KM
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## skipan av fiskiskapi í sambandi við ferðavinnu

Við heimild í § 35, stk. 3 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin skipar fiskiskap við fiskifari í føroyskum sjógvi í sambandi við ferðavinnu.

*Fiskiloyvi*

**§ 2.** Ferðavinnufiskiskapur kann bert fara fram við fiskifari, sum eftir umsókn hevur fingið fiskiloyvi frá Vørn til slíkan fiskiskap.

**§ 3.** Loyvi til ferðavinnufiskiskap í føroyskum sjógvi kann verða latið eigara av fiskifari til egið fiskifar undir føroyskum flaggi fyri eitt fiskiár í senn.
*Stk. 2.* Ferðavinnufiskiskapur er undantikin kravinum um veiðiloyvi. Fiskifarið skal tó lúka treytirnar í § 5, stk. 1, nr. 3-5 í løgtingslógini.
*Stk. 3.* Fiskifar, ið fiskar sambært hesi kunngerð, kann á sama túri ikki skifta til annan vinnuligan fiskiskap.

*Treytir*

**§ 4.** Fiskiskapurin kann bert fara fram við tráðu, snøri ella hondsnellu.
*Stk. 2.* Fiskiskapur er ikki loyvdur á leiðum, sum eru friðaðar sambært kunngerð um at friða ávísar leiðir í føroyskum sjógvi fyri veiðu við troli og øðrum reiðskapi ella sambært kunngerð um tíðaravmarkað veiðibann á gýtingarleiðum.
*Stk. 3.* Loyvt er ikki at avreiða veiðu frá ferðavinnufiskiskapi. Veiða kann ikki seljast ella latast øðrum við vinningi fyri eyga.

**§ 5.** Hvørt ferðafólk kann í fiskiárinum fiska í mesta lagi 60 kg av fiski í rundari vekt.

**§ 6.** Veiðan skal gerast upp í rundari vekt fyri hvønn túr og hvørt ferðafólk sær.
*Stk. 2.* Eigarin og skiparin ella bátsformaðurin av fiskifarinum skulu tryggja, at allar treytir í kunngerðini og loyvinum verða hildnar.
*Stk. 3.* Eigarin og skiparin ella bátsformaðurin av fiskifarinum hevur skyldu at kunna ferðafólk, sum luttaka í ferðavinnufiskiskapi, um treytirnar fyri fiskiskapinum, harundir um avmarkingar í nøgd sambært § 5.

*Fráboðanir*

**§ 7.** Skiparin ella bátsformaðurin á fiskifarinum skal senda Vørn (vorn@vorn.fo) fráboðan um veiðu í nøgd, býtt á fiskaslag fyri hvønn túr. Upplýsast skal eisini um tal av og nøvn á ferðafólki á hvørjum túri sær. Fráboðanirnar skulu sendast Vørn beinanvegin, tá túrurin er liðugur.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert